## Veiðivirðið veksur

Landingarvirðið hjá íslendsku fiskiskipunum níggju teir fyrstu mánaðirnar í ár var væl størri enn í sama tíðarskeiði í fjør. Til 30. septembur í ár landaðu skipini fyri 62 mia. íslendskar krónur, og tað var fýra mia. ella næstan sjey prosent meiri enn somu mánaðir í 2006. Hagtølini vísa, at landingarvirðið á botnfiski vaks sjey prosent. Landingarvirðið á uppisjóvarfiski hækkaði heili 17 prosent, og her var tað serliga lodnan, sum gjørdi mun.



## Stórt nám í Grønlandi

Líkt er til, at Molybdæn-námið, sum kanadiska námsvinnufelagið Quadra Mining fyrireikar norðan fyri Illoqqortormiut í landnyrðingspartinum av Grønlandi verður tað størsta arbeiðsplássið í grønlendsku námsvinnuni. Í byrjanini verður brúk fyri umleið 600 monnum, og seinni fáa ætlandi umleið 300 fast arbeiði í náminum, sigur KNR. Fyri at útvega fólk við førleika hevur landsstýrið játtað 50 mió. krónur til ein námsskúla, sum byrjar næsta ár.

# Færri handlar í miðbýnum




*Hans Waag (vinstrumegin) og Ólavur Gregersen frá Bitlandi hava undirskrivað eina leiguavtalu. Nú verða tveir handlar og ein skrivstova í Handilskjarnanum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Í morgun byrjaði ein útsøla av barna- og damuklæðum í Handilskjarnanum í Havn. Hetta er samstundis fyrsta teknið um broytingarnar í stóra handilsbygninginum: Tveir handlar fara nevniliga út og ein skrivstova kemur ístaðin.**

HANDILSVINNA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Miðbýurin, Havn:** - Vit hava ikki fingið tað at hanga nóg væl saman fíggjarliga í hesum báðum handlunum, sigur stjórin í Handilskjarnanum, Hans Waag við Sosialin.

Frá at hava verið ein kjarni av handlum, verður virksemið í bygninginum nú broytt, soleiðis at ein skrivstova eisini fer at húsast her.

Í gjár varð nevniliga eitt leigumál undirskrivað við fyritøkuna Bitland, sum hevur til endamál at fáa Føroyar til eitt land, har altjóða virkir og føroyingar menna og royna nýggja tøkni.

> *Vit hava í roynd og veru havt sama umsetning í hesum báðum deildunum, síðani vit yvirtóku virksemið í november 2004. Og tað er ikki nóg gott*
> *(Hans Waag, stjóri í Handilskjarnanum)*

Bitland fer at leiga seg inn í tvær tær ovastu hæddirnar, meðan handlar framvegis verða í veghæddini og 1. hæddini.

- Tað er sjálvandi keðiligt fyri miðbýin, nú tveir handlar fara hiðani. Eingin ivi um tað.

- Men eg eri kortini noyddur at hugsa um okkara virksemi, slær Hans Waag fast.

Hereftir verða ein skógvahandil, ein handil við mannfólkaklæðum og Bitland í Handilskjarnanum.

### Gott konsept

Tað var á heysti fyri trimum árum síðani, at Hans Waag og onnur yvirtóku stóra bygningin í miðbýnum í Havn.

Tá vóru fleiri handlar og leigumál í Handilskjarnanum, og sum so líðandi eru vorðin avloyst av øðrum handlum.

Inntil í morgun var bygningurin býttur upp í fýra deildir – skógvar og harrar, og eisini deildir fyri børn og damur. Nú kemur ein skrivstova inn aftrat.

- At hava allar fýra deildirnar á einum og sama staði, hóskaði væl til okkara konsept um at hava ein handilsbygning fyri alla familjuna, greiðir Hans frá.

Í november mánaði høvdu teir støðuna til viðgerðar, og avgjørdu tá, at lata tveir av handlunum aftur.

Síðani byrjanina hava teir keypt handilin Deres, samstundis sum skógvahandilin Bianco er farin niðan í SMS.

### Rættar vørur

Orsøkin til at teir nú hava avgjørt at lata damudeildina og barnadeildina aftur er einføld: Tær góvu ikki nóg nógv av sær fíggjarliga.

- Tað hevur nevniliga víst seg at vera sera tungt at fáa fólk at fara upp í tær ovaru hæddirnar í bygninginum

- Vit hava í roynd og veru havt sama umsetning í hesum báðum deildunum, síðani vit yvirtóku virksemið í november 2004. Og tað er ikki nóg gott, sigur Hans.

Hinvegin kann hann vísa á sera góð úrslit í harradeildini og skógvadeildini. Í roynd og veru er umsetningurin í harradeildini tvífaldaður hesi seinastu trý árini.

- Orsøkin til hetta er uttan iva hon, at vit hava havt tær røttu vørurnar og at tørvur hevur verið á einum slíkum handli, staðfestir stjórin.

## Tørva pláss til bilar

Í nógv ár hevur verið nógv tosað um, hvussu ein skal menna Miðbýin í Havn.

Gongdin í seinastuni hevur kortini verið hon, at alt fleiri og fleiri skrivstovur eru komnar at liggja við gøturnar í Miðbýnum. Og nú fylgja so tvær hæddir í Handilskjarnanum aftrat hesi gongdini, hóast teir eru greiðir um, at tað er sera óheppið um ein fær ein miðbý uttan handlar.

Hans Waag vísir á, at ein stórur trupulleiki í Miðbýnum er parkeringsviðurskiftini.

- Tað er ikki vorðið lættari at finna eitt parkeringspláss her tey seinastu trý árini, staðfestir hann.

Bæði parkeringsøkið á Skálatrøð og í Mortansstovubrekku eru hvønn einasta dag fullsett av bilum longu tíðliga fyrrapart, og síðani er trupult hjá viðskiftafólkum hjá handlum og skrivstovum í býnum at finna eitt øki at seta bilin frá sær.

- Vit uppliva ofta, at fólk standa í kø frammanfyri diskin, men mugu knappliga renna avstað, tí tey mugu út at flyta bilin. Slíkt er ikki til frama fyri nakran, sigur Hans Waag.

sb.